# Ingi saknar skríggini

**– Eg sakni føroyska list við einum boðskapi. Tað undrar meg til dømis stórliga, at sterku tjóðskaparkenslurnar so sjáldan síggjast aftur í okkara list, sigur Ingi Suni Jacobsen, sum í løtuni sýnir fram í Leikalund í Klaksvík**

LIST

*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin*

So ger ungi listamaðurin Ingi Suni Jacobsen aftur vart við seg. Vit hava fyrr sæð onkran málning hjá Inga, eitt nú á Norðoyastevnuframsýningini síðsta ár, og eisini tá sást, at ungi listamaðurin úr Klaksvík hevur okkurt heilt serligt uppá hjarta.

### Innara menniskja

Málingarnir, sum hanga



*– Eg vildi ynskt, at føroysk listafólk tordu betri at koma við einum skríggjandi boðskapi, sigur Ingi Suni Jacobsen, sum í løtuni hevur framsýning í Leikalund í Klaksvík*
*Mynd: Jens K. Vang*

uppi í Leikalund hesar dagarnar, eru hvør sær smáar súmbolistiskar og í løtum rættiliga surrealistiskar liteksplosiónir. Kláru litirnir og einføldu strikurnar geva við fyrsta eygnabrá myndunum ein glaðan, mestsum naivan dám, men sjálvur sigur listamaðurin, at aftanfyri fjalir seg eisini ein lýsing av pínu og líðing.

– Eg royni at útrykkja tað innara menniskja. Pína, líðing og sorg liggja mær sum oftast frammaliga í huganum, men onkustaðni aftanfyri finna vit altíð kærleikan. Í míni verð vinnur kærleikin altíð til endan, og tað royni eg eisini at fáa fram í myndunum, sigur Ingi Suni.

Sum íblástur nevnir hann tónleikin og tekstirnar hjá írska bólkinum U2 og yrkingasavnið "Ongin sól er til" hjá Peturi Jensen.

– Eg eri hugtikin av U2 og Peturi Jensen, tí teirra verk eru góð listarlig handverk. Slíkt er altíð inspirerandi, og tú kanst læra nógv av tí. Men eg eri ikki minst hugtikin av teimum, tí teir hava ein boðskap. Tað sakni eg ofta í føroyskari list. Eg sakni list, sum skríggjar sín boðskap út og fær okkum at rakna við. Og tað skuldi verið nokk av ektaðum kenslum at tikið av, heldur Ingi Suni, sum sjálvur ofta roynir at flætta ein gløðandi tjóðskaparligan boðskap inn í myndirnar.

### "Deyðssyndirnar" í løgtingið

Ungi listamaðurin heldur tað ikki vera sørt undarligt, at føroyska samfelagið og listin ofta tykjast so stirvin og konservativ, hóast vit vita, at tað finnast nógvar listarligar kreftir, sum bara bíða eftir at venda kenslunum út á ranguna

– Eg haldi til dømis, at tað er nokkso løgið, at man hevur valt ein so fánaðan málning, sum handan hjá Ingolvi av Reyni, at hanga í løgtinginum, sum eitt slag av ímynd av okkum føroyingum, sigur Ingi Suni.

Spurdur, hvønn málning hann heldur kundi hugsað sær at sæð í løgtinginum, sigur Ingi Suni avgjørdur.

– Eg kundi hugsað mær at sæð "Tær sjey deyðssyndirnar" hjá Edvard Fuglø. Málningarnir eru ótrúliga flottir, og boðskapurin ógvuliga sigandi og greiður.

### Zarathustra og listin

Ingi Suni hevur fingist við at mála seinastu fimm árini, og eftirhondini hevur hann verið við á fleiri framsýningum í Føroyum. Hann hevur eisini roynt seg eitt sindur sum yrkjara, men fann skjótt út av, at tað er ígjøgnum myndlistina, hann vil úttrykkja seg. Hann lesur nógv, serliga heimsspeki, og er millum annað sera hugtikin av Friedrich Nietzsche.

– Nietzsche hevur nakrar hugleiðingar í "Soleiðis talaði Zarathustra" av tvístøðuni hjá listamanninum, sum eg haldi vera sera rámandi. Einastaðni tosar hann til dømis um, hvussu Zarathustra fer úr síni holu, gløðandi og sterkur sum ein morgunsól, sum kemur frá myrkum fjøllum. Soleiðis síggi eg eisini onkuntíð meg sjálvan sum listamann, hugleiðir Ingi Suni Jacobsen.



*"Hurðin inn í ævinleikan",*



*"Sosialistiskur sigur",*



*"Maður og Kvinna"*

*Myndir: Bárður Lydersen*

# Kappróðarfelagið fær fyribils drátt

**Nú um dagarnar síggjast gravkýr grava ein part av útfyllingini niðri við Sandin í Klaksvík uppaftur. Ein nýggjur dráttur til bátarnar hjá Klaksvíkar Kappróðarfelag er nevniliga umbúna, men sum skilst á Teknisku deild, miðar arbeiðið, sum fer fram í løtuni, bert móti eini fyribils loysn**

KLAKSVÍK

*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*

Ein av avleiðingunum av útfyllingini niðri við Sandin í Klaksvík gjørdist rættiliga skjótt, at drátturin hjá Klaksvíkar kappróðrarfelag mátti lúta. Ætlanin hjá býráðnum hevur allatíðina verið at gera ein nýggjan drátt, men hetta arbeiðið fer at bíða, so leingi tað ikki er greitt, hvar kappróðrarneystið skal flytast. Tískil eru fólk frá kommununi farin undir at gera ein fyribils drátt, so bátarnir kunnu flotast sum vanligt, nú manningarnar skjótt fara at byrja at venja aftur.

Hóast neyðugt hevur verið at grava ein rættiliga fittan part av útfyllingini upp aftur, kemur hetta ikki at órógva økið, har tað er ætlanin at byggja handilsmiðstøðina, frætta vit frá Teknisku Deild hjá Klaksvíkar býráð.



*Gravkýr grava í løtuni ein part av útfyllingini niðri við Sandin uppaftur fyri gera ein fyribils drátt til Klaksvíkar Kappróðrafelag*